# ÁRSINS VITANARFRÓÐU

# HVØRJI DÝR FINNA VIT Í FJØRUNI Í KVÍVÍK?



Granskarar: Isabella F. í Kálvalíð, Andras Pauli Split Dam, Adriana H. Kristiansen, Helga av Trøð Lauritsen, Dánjal Sigird F. í Kálvalíð, Bjørg Edvardsdóttir

# INNGANGUR

Í Kvívík hava vit eina vakra stóra fjøru. Til dagligt geva vit okkum ikki ordiliga far um, hvat mann finnur har, annað enn steinar og onkra gággu. Vit hildu, at tað kundi verið áhugavert at funnið útav, hvørji dýr veruliga eru har.


Lærarar:

Malan Petersen malan.petersen@skulin.fo & Turið á Tórgarði turi.a.torgardi@skulin.fo

Luttakarar:

Isabella F. í Kálvalíð, Andras Pauli S. Dam, Adriana H. Kristiansen, Helga av Trøð Lauritsen, Dánjal Sigird F. í Kálvalíð, Bjørg Edvardsdóttir



Vit loyva, at frágreiðingin verður løgd á gransking.fo, og at tilfar úr henni kann verða nýtt til marknaðarføring.

# INNIHALD

1. Hetta undrast vit á

2. Hví er tað so?

3. Leggið eina ætlan

4. Savnið upplýsingar

5. Hetta eru vit komin fram til

6. Sigið øðrum frá

7. Fylgiskjøl

# 1. HETTA UNDRAST VIT Á

Hvørji dýr finna vit í fjøruni í Kvívík?

# 2. HVÍ ER TAÐ SO?

Vit halda at vit fara at finna fliðu, krækling og gjar

# 3. LEGGIÐ EINA ÆTLAN

- Vit fara oman í fjøruna í Kvívík, og vita, hvat er at finna.
- Tá ið vit hava funnið dýrini, fara vit at sortera tey í skúlanum.
- Síðani fara vit at skriva um tey ymisku dýrini. Vit skriva um eitt til tvey dýr hvør ímeðan ein av okkum fer at gera eitt eyðmerkingarskjal, so vit lætt kunnu hava skil á, hvat vit hava funnið.
- Tá vit hava samla alt saman, fara vit at seta okkum at skriva.
- Vit halda, at eyðmerkingarskjalið eisini er gott hjá øðrum at brúka. Gott at laminera og hava við sum eina ‘lummabók’, tá mann fer ein túr í fjøruna.

# 4. SAVNIÐ UPPLÝSINGAR

Vit hava funnið gjar, lúsakrabba, fliðu, streymgággu, purpurkúving, fjørukúving, toppkúving, marfluga, trøllanegl og taralús, men vit funnu ongan krækling.

# 5. HETTA ERU VIT KOMIN FRAM TIL

**Fjørukúvingur**: Er umleið 1,5 cm breiður. Hann livir sum oftast ovarlaga í fjøruni. Á tunguni eru smáar tenn. Fjørukrabbi situr ofta á kletti og etur skornan tara.

**Fliða**: Fliða er ein snigil í einari gággu. Ein fliða etur algur og  annað, sum veksur rundan um hana. Tú kanst gott eta fliður, men ikki ov ofta. Fliðan sýgur seg fastan á hellu, stein o.l., so hon ikki tornar.

**Gjar**: Er ein lítil krabbi, sum býr í gjarinum, og tá hann er svangur, stingur hann beinini úr gjarinum og etur úr einum ørum gjari. Tá gjar er larva, festir tað seg á steinar, hellu o.a. Ein lúka er í gjarinum sum krabbin stingur beinini úr. Krabbin liggur á rygginum í húsinum og hann hevur fýra bein hvørjum megin.

**Lúsakrabbi**: Lúsakrabbi eitur Lúsakrabbi, tí hann líkist eini lús. Lúsakrabbi livir í størri dýpi enn vanligur fjørukrabbi. Á skelini eru smáar bustir við krókum á, sum tari ofta kemur á. Hann er sera átufrekur og kann saktans eta ein krossfiskaarm, meðan hann heldur við bitklónum. Tá bítur krossfiskurin armin av sær og so etur krabbin armin. Um tað er ein kúla úteftir er tað ein hannkrabbi, og um ongin kúla er, er tað ein honkrabbi.

**Marfluga**: Marfluga er ordiliga kvik at goyma seg. Marflugur krógva seg um dagin og fara út um náttina at leita sær føði. Nakrar marflugur eta livandi kykt og aðrar eta deyð. Marfluga eru grønlig ella brúnlig og eru tær oftast tvær og tvær. Marflugur fáa 10-150 egg sum klekjast í einum klekiposa undir búkinum. Ungarnir liggja í posanum til teir vaksa og líkjast foreldrunum.

**Purpurkúvingur**: Er 2-3 cm langur og er morgráur, ljósur ella gulur, alt eftir, hvat hann hevur etið. Hann er vanligur við sjóvarmálan. Hann er fullvaksin, tá hann er 2,5 ár.

**Taralús**: Taralýs liva í tarabløðum. Taralús minnir eitt sindur um marflugu, men hon er fløt. Taralús er ikki kræsin og etur nærum alt. Hon hevur ymsan lit, alt eftir, hvussu tarin hon situr á sær út. Mann finnur taralús við at leita á stórum tarabløðum, tá ið fjøra er. Skalt tú fanga taralús í sjónum, er hent at hava glúp.

**Toppkúvingur**: Toppkúvingur etur algur og tara. Mann finnur teir sum oftast við opið hav. Støddin kann vera nokkso ymisk, alt frá 1 – 10 cm. Tó er mest vanliga støddin 1 – 3 cm.

**Trøllanegl**: Trøllanegl sær út sum ein hálvur kræklingur sum hevur ongar rukkur.

# 6. SIGIÐ ØÐRUM FRÁ

Vit gera eina plansju at heingja upp í skúlanum og nú siga vit eisini tykkum frá.

# FYLGISKJØL

1. Eyðmerkingarblað

2. Mynd av plansjuni

# Eyðmerkingar-blað

Bygd/bý: ______

Hvar: ______

Navn: ______

Hvat finni eg?

| | Mynd | Vitan | |
|---|---|---|---|
| Gjar<br>*(Balanus)* |  | Gjar er eitt krabbadýr og festir seg á steinar o.a., tá tað er larva. | |
| Lúsakrabbi<br>*(Hyas)* |  | Lúsakrabbi hevur fingið navnið, tí hann líkist eini lús. Lúsakrabbin livir í størri dýpi enn vanligi fjørukrabbin. Hann er sera átufrekur. | |
| Fliða<br>*(Patella vulgata)* |  | Fliða er ein snigil. Fliðan sýgur seg fasta á hellu ella steinar, soleiðis at hon ikki tornar. Fliðan livir av algum. | |
| Streymgágga<br>*(Neptunea antiqua)* |  | Streymgágga er ein sjósnigil, ið livir mest í djúpum streymasjógvi. Tað kemur meira enn so fyri, at hon skolar upp á land, tá hon doyr. | |
| Purpurkúvingur<br>*(Nucella lapillus)* |  | Purpurkúvingur er eitt satt rovdjór. Hann drepur bæði gjar og krækling. Hann borar hol ígjøgnum skelina á kræklinginum/gjarinum og etur tann vegin. | |
| Fjørukúvingur<br>*(Littorina)* |  | Fjørukúvingur livir oftast ovarlaga í fjøruni. Hann hevur rívitungu við smáum tonnum, sum hann brúkar tá hann rívur føðina í seg. | |
| Toppkúvingur<br>*(Gibbula cineraria)* |  | Toppkúvingur heldur til á sandbotni ella tara á grunnum sjógvi. Toppkúvingur er breið-vaksin, men smalkar í ein topp. | |

# Eyðmerkingar-blað

Bygd/bý: ____________

Hvar: ____________

Navn: ____________

Hvat finni eg?

| | Mynd | Vitan | |
|---|---|---|---|
| Marfluga *(Gammarus)* |  | Marflugur liva bæði í sjógvi, blandingsvatni og í vøtnum. Marfluga etur nærum alt, sum fyri er, eisini deyðan fisk. | |
| Trøllanegl *(Acmaea virginea)* |  | Trøllanegl sær út sum ein hálvur kræklingur, sum hevur ongar rukkur. | |
| Taralús *(Isopoda)* |  | Taralýs liva í tarabløðum. Taralús minnir eitt sindur um marflugu, men hon er fløt. Taralús er ikki krasin og etur nærum alt. Hon hevur ymsan lit, alt eftir, hvussu tarin hon situr á sær út. | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |


Fjørukúvingur
Fjørukúvingur sitar
oftast á kletti og etur
Purpurkúvingur
Longdin er 2-3 cm
etur gjar og krækling
Hann er vanligur
Hann leggur 100-1000 egg
Streymgágga
FLIÐA
Gjar
Toppkúvingur
Etur: Algur og Tara
Stødd: 1-10 cm
Trøllanegl
Lúsakrabbi
MARFLUGA
Taralús